beiða saman og tosa deyvamál saman, sigur Ásmund.

## Parabol

Í lívinum hjá Ásmundi er ikki bert arbeiði á skránni. Hann hevur íbúð í Havn og hevur fleiri ítriv í frítíðini.

Íbúð hevur hann í Deyvahúsinum við Íslandsvegin í Havn. Har býr hann í einum kamari saman við tveimum øðrum deyvum monnum.

Har hava teir eitt kamar í part, men hava felags køk, bað og matstovu. Í eina tíð hava teir bert verið tveireinir í húsi, tí tann eini hevur verið til skips. Hann er afturkomin nú, so nú eru teir tríggir.

Ásmund dámar væl at lesa. Hann lesur tey føroysku bløðini og annað. Og so hyggur hann nógv í parabol, serliga eftir fótbólti, sum jú ikki krevur so nógvar frágreiðingar um tað, sum fer fram.

Annars so eiga foreldur hansara seyð í Kunoy, og sjálvur eigur hann eisini seyð har.

## Tíðindasending

Eitt er tó fast pura fast á skránni hjá Ásmundi. Tað er endursendingin av tíðindasendingini "Dagur og vika" .

Hann arbeiðir til kl. 17:30 og skundar sær síðani heima, tí hann veit at kl. 18:05 kemur ein av sendingunum, sum hann veruliga og allarmest vil sleppa at síggja.

Hetta er jú tíðindasendingin frá kvøldinum fyri, og sum nú verður tulkað fyri teimum deyvu. Og hinvegin, tey hoyrandi sum ikki sóu hana kvøldið fyri, kunnu so bara hyggja eftir henni tá ístaðin fyri.

Men var tað ikki fyri tulkingini, so hevði Ásmund verið henda møguleikan fyri uttan, at kunna fylgja við í teim tíðindunum, sum sjónvarpið hevur valt at borðreiða fyri hyggjarunum.

Einasti trupulleikin hjá Ásmundi í so máta er um summarið, tí tá verður hon send eitt sindur fyrri um kvøldið - kl. 17:30.

– Tá nái eg ikki heim til hon byrjar, men tá plagi eg bara at taka hana upp á videoband, sigur Ásmund.

## Færri til hugnaløtur

Eitt annað fast punkt á vikuskránni hjá Ásmundi er hugnaløtan í Deyvahúsinum.

Henda hugnaløtan verður hildin annaðhvørt mánakvøld.

Her koma tey deyvu saman at hugna sær. Tey lesa bløð, tey práta saman og tey spæla eisini onkur spøl saman. Onkutíð er spurnarkapping á skránni.

Meðan tey fyrr vóru munandi fleiri til hetta hugnaliga tiltakið, eru tey nú sum oftast bert eini trýfýra savnaði saman.

– Vit eru munandi færri nú, tí tey deyvu nú er spjødd meiri kring landið.

– Tey hava sítt arbeiði, og orkaði kanska ikki so væl at koyra til Havnar eftir loknan arbeiðsdag, heldur Ásmund.

## Sæð, men ikki hoyrt

Eitt mánakvøld herfyri gjørdu tey kortini eitt sindur meiri burturúr hesi hugnaløtuni.

Frammanundan hevði ein sera áhugaverd sending verið í sjónvarpinum um arbeiðið inni í tunlinum undir Leirvíksfjørð.

Ásmund hevði bara SÆÐ sendingina, men hann hevði ikki HOYRT alt tað sum har varð sagt. Hetta evnið hevði jú hansara stóra áhuga sum tað hevur fyri ein rættan klaksvíking.

Hann tók sendingina uppá band, og bílegði síðani ein tulk til at tulka sendingina fyri teimum deyvu.

Og hetta kvøldið var so Norðoyatunnilin á skránni, tá tey deyvu hittust til hugnakvøldið í Deyvahúsinum.

– Hetta var ein sera áhugaverd sending, sum eg nú fekk nógv meiri burturúr, sigur hann.

# Forlovaður við danskari gentu

**Hóast Ásmund er deyvur, so er tað eingin forðing fyri at hann eisini hevur eyga fyri tí vakra og hevur kenslur mótvegis konufólki**

DEYVLEIKI
*Snorri Brend*

– Ja, eg eri faktiskt forlovaður við eini danskari damu, ið eisini er deyv, sigur Ásmundur uttan at smæðast.

Henda gentan – Gudrun - er hálv donsk og hálv grønlendsk, og eigur frammanundan ein son, sum altso er hoyrandi.

Tey møttust á nýggjárinum fyri sløkum 1 1/2 ári síðani, tá Ásmund var á vitjan í Danmark.

– Eg var eitt sindur smæðin tá, men hon virkaði fitt og vit tosaðu eisini saman. Í mai mánaði í fjør kom hon til Føroyar at ferðast. Tá hitti eg hana aftur, og tá blivu vit av álvara forelskað.

– Men tað var tá eg var niðri í Danmark í fjør summar, at vit byrjaðu at ganga saman. Og tað hava vit gjørt síðani tá, sigur Ásmund.

Tá tvey soleiðis byrja at ganga saman er telefonin eitt hent amboð fyri at halda sambandið viðlíka. Men hesin møguleikin er ikki eins lættur hjá tveimum deyvum, sum eru góð hvørt við annað.

Tey funnu tó upp á ráð: Tey byrjaðu at chatta saman, og tí dag er hátøknin komin í hásætið umvegis webmyndatólini.

– Gjøgnum hetta myndatólið kunnu vit halda sambandið viðlíka. Jú, hetta myndatólið er heppið tá ein er forelskaður, sigur Ásmund.

## Ábyrgdari

Í mong ár hava tey deyvu havt møguleika at gera nýtslu av teknmálstulkinum Edni Poulsen. Men frá 1. mars í ár er nú ein slíkur tulkur komin aftrat, nevniliga Rannvá Eiriksdóttir – uttan hana, var henda samrøðan við Ásmundi ikki gjørlig.

Fyri Ásmund og hini deyvu kring landið er henda tænastan óundverulig. Uttan tulk fáa tey deyvu bara helvtina við av tí, sum fer fram rundan um tey.

– Tá vit hava ein tulk við, so kunnu vit fáa alt við. Tey tulka tað sum verður sagt, og tí er tað ein stórur tryggleiki í tí, at tað sum verður sagt, eisini verður tulkað á rættan hátt, sigur hann.

Ein slíkur tulkur er serliga heppin í ávísum førum. Ásmund hevur sjálvur við takksemi brúkt henda tulkin sum sambindingarlið, tá okkurt hevur verið galið við bilinum. Ella tá hann skal keypa sær ein nýggjan bil, og tá ein skal samráðast um ein prís.

Ásmund er eisini í familju við ábyrgdarpersón í Norðoya Sparikassa, og tí er hann sjálvandi eisini ein av teimum mongu ábyrgdarunum í hesum sparikassanum, hvørs heimstaður er Klaksvík.

– So tá ábyrgdarafundur hava verið í sparikassanum, so biði eg altíð ein tulk koma við á hesar fundir.

– So veit eg, at eg fái alt við av tí sum verður frásagt, sigur Ásmund.

# Rannvá tulkar fyri teim deyvu

**Uttan ein teknmálstulk fingu tey deyvu bert ein part av tí við, sum verður sagt t.d. í sjónvarpinum**

DEYVLEIKI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Rannvá Eiriksdóttir er nýsett í starv sum teknmálstulkur, og er er í ferð við at tulka eina av tíðindasendingunum hjá Sjónvarpinum*

- At samskifta við onnur.

Tað er ein tann mest grundleggjandi rætturin hjá menniskjum, - hetta at kunna tosa við onnur, líkamikið um tú hevur allar sansir, ert deyvur ella tú ert blindur.

Nógvir hentleikar eru komnir fram tey seinnu árini samstundis við ta teknisku menningina. Men hjá teimum deyvu er kortini teknmálið og teknmálstulkingin tað, sum hevur verið brúkt í langar tíðir.

Í Føroyum hava tey deyvu eisini havt møguleika at kunna samskifta við tey hoyrandi gjøgnum teknmálstulkar, og í dag er skipað ein serstøk Teknmálstulkatænasta.

Til hesa tænastuna hevur Edni Poulsen verið knýtt at sum einasta starvsfólk, men síðani 1. mars í ár hava tær verið tvær, nú Rannvá Eiriksdóttir varð sett í starv hálva tíð.

Ein av hennara uppgávum er at tulka tíðindasendingina í sjónvarpinum fyri teim deyvu. Annars fer hon út í arbeiði sínum, tá t.d. føðingardagar, fundir og onnur tiltøk eru á skránni sum teknmálstulkur.

Og samrøðan við Ásmund á hesi síðuni er eisini gjørd við hennara hjálp. Tí kann ein siga, at arbeiðið hjá teknmálstulkinum er líka so nógv eitt arbeiði fyri tey hoyrandi sum fyri tann deyva.

## Einføld innrætting

Seinasta fríggjamorgun var hon aftur til arbeiðis í hølunum hjá Sjónband, har tíðindasendingin verður tulkað.

Kvøldið fyri hevði sjónvarpið havt eina av sínum regluligu "Dagur og Vika"-tíðindasendingum, og fríggjakvøldið skuldi hon so endursendast við tulking.

Rannvá hevði frammanundan sjálv sæð hesa sendingina hóskvøldið kl. 20, tá hon varð send, og hevur síðani hugt eftir henni fleiri ferðir.

At byrja við hugdi hon eftir eini slíkari tíðindasending upp í tíggju ferðir, fyri líkasum at fáa alt við - árstøl, nøvn og nógv onnur fakta – tí sjónvarpsfólkini tosa so skjótt.

– Men nú eri eg komin í meiri venjing, so nú hyggi eg eftir sendingini einar 3-4 ferðir, áðrenn eg byrji at tulka, sigur Rannvá.

Hon kemur til arbeiðis sum vanligt, og fer so niður í eitt rúm í kjallaranum, sum er innrættað til hennara arbeiði.

Tá sagt verður "innrættað" so er tað bert partvíst rætt, tí innrættingin er sera einføld: Ein hvítt-málaður veggur sum bakgrund, og síðani eitt video og eitt sjónvarp frammanfyri, har sendingin er at síggja.

Út frá hesum er tulkar hon so tíðindini, sum tann vanligi hyggjarin eisini kann síggja, tá sendingin verður endursend kl. 18:05.

Og hon veit, at ein teirra sum so trúfastur situr frammanfyri sjónvarpið kl. 18:05 er Ásmund Reyðberg.

Uttan hennara arbeiði hevði hann ikki fingið meiri enn helmingin við av tíðindasendingini. Nú kann hann av álvara fylgja við í samfelagstjakinum.